sólorka




# Vísmenninir á Vaglinum

Í heyst trína teir aftur á pallin á Vaglinum – teir tríggir klóku sólorku-professarararnir: Pál Weihe, Eyðun Andreassen og Jóan Pauli Joensen. Tilsamans vita teir alt, sum er vert at vita, og nakað væl afturat, og tí ætla vit okkum at gera okkum dælt av.

Professorala triumvirat okkara fer at orna framløgurnar á Vaglinum. Ætlanin er at fortelja og kjakast um alt millum himmal og jørð – frá ramum gandi og gomlum føroyskum heimaráðum til boppudólgar og skrindusúpan. (Á myndini hava teir longu sett skjøtil á).

Nú eru teir fakmenn, so skil verður í galskapinum, men hóast tungu tingarligu heitini eru teir allir kendir sum humoristar.



# Fyrstafloks undirhald



Tilsamans hava teir væl yvir hundrað ára royndir á palli, og nú fáa vit aftur eitt forkunnugt høvi til at uppliva teir.

Robert McBirnie og Hilmar Jan Hansen kunnu fylla pallin saman og hvør sær, og undirhald teirra fevnir um alt frá skemtisøgum, tættum og herming til syrpur og annan sang.

Tveir av fólkakærastu undirhaldarum okkara, ið duga eitt sindur av hvørjum, fara at lívga um okkum í heystsetuni, har teir í fleiri umførum fara at leita fram nýtt og gott gamalt.

Leysasøgur siga, at hesin til vinstru fer eisini at leggja leiðina framvið.